

*Foreldrini hjá Hans Petur vóru Jákup og Malan*

Petur eisini! Tá vísti tað seg, at abbin var Gabriel, og tey bæði vóru trýmenningar. Sanniliga er heimurin lítil.

Petronella var abbadóttir Skipar Hansen. Sonur hansara Christian Rosenmeier Hansen f. 1811 fór norð á Trøllanes sum húskallur. Hann giftist við Malenu úr Innistovu, og tey búsettust í Uppistovu. Tey eru fysta ættarlið hjá núverandi Wolles-ættini í Uppistovu.

Skipar Hansen fekk sín leiklut í Føroya søgu, tá ið Brillumaðurin herjaði í 1808.

Hetta ár komu fleiri skip inn á Havnina og søgdu seg at vera fronsk, og sum vildu verja okkum móti enskum ófriðarkroppum. Tey vístu seg at vera enskir sjórænarar.

Eitt av hesum skipum var skipið hjá Brillumanninum. Upprunaliga varð hann hildin at vera fransur, og tí varð hann væl móttikin í fyrsta umfari.

Skipar Hansen hevði verið umborð fyrr um dagin. Honum mundi ikki dáma skilið, og hann slapp sær í land og niðan í hagan at krógva seg. Brillumaðurin kom í land og vildi hitta Skipar Hansen. Tá hann ikki var at finna, spann øði í Brillumannin. Hann kravdi at fáa hendur á Skipar Hansen í stundini, ella vildi hann seta eld á Havnina. Tað fór hvør maður at leita, og at enda var hann funnin uppi við Tarvastein, har hann hevði krógvað seg. Teir fara í skundi oman til Havnar við honum, men tá var Brillumaðurin longu farin at skjóta við kanónum inn á Havnina. Teir fingu so Skipar Hansen umborð og skipið fór avstað.

Tá ið Brillumaðurin í august kom siglandi fram við Føroyum, lat hann menn sínar seta Skipar Hansen á Dalsfles. Tað var takkarlønin fyri, at hann hevði stýrt skipinum gjøgnum váðasjógv, bæði her og uppi undir íslandi.

Til alla lukku fingu dalbingar eyga á hann og kundu bjarga honum, men tá var hann nærum deyður.



*Petronella, omma Hans Petur, kom av Trøllanesi.*
*Hon var abbadóttir Skipar Hansen*

## Faðirættin av Lakjuni í Fuglafirði

Pápi Hans Petur var kallaður Fuglafjarða Jákup, og sum tað liggur í heitinum var hann ættaður úr Fuglafirði. Aðrir brøður Jákup vóru Jógvan, sum búsettist á Lakjuni í Fuglafirði, Líggjas, sum giftist til Hellurnar og Johan. Systrarnar vóru Poulina, sum giftist á Stongunum í Klaksvík og Súsanna, sum giftist á Rætt í Syðrugøtu. Hon átti eisini ein Hans Petur, sum giftist til Fuglafjarðar. Tískil er ættin í Fuglafirði sera stór.

Johan bleiv starblindur 36 ára gamal. Einaferð Jákup kom til Fuglafjarðar at ferðast, fór Johan við honum til Lorvíkar, og her kom hann at verða til hann doyði 72 ára gamal.

Jákup var yngstur av systkjunum. Foreldrini Poul og Margretha doyðu ung, og Jákup fór sum 9 ára gamal til Húsar, har hann var at vera hjá Hanusi á Heygnum. Tey vóru barnleys, men tað var fitt av jørð, 3 merkur, í húsinum. Illa longdist Jákupi aftur til Fuglafjarðar. Hann plagdi javnan at fara niðan Brekku, so hann kundi síggja inn á heimbygdina. Jákup var so á Húsum inntil hann giftist.

## Giftist til Lorvíkar

Jákup giftist inn á Mýru í Lorvík. Maðurin í húsinum var druknaður á Norðhavinum. Kona hansara Marin Malena var av Viðareiði, og var flutt aftur til Viðareiðis. Í húsinum vóru 2-3 gyllin í jørð, og foreldrini hjá Hans Petur keyptu hús og jørð. Afturat hesum átti Johan tríggjar gyllin, so tey vóru ikki sør í so máta. Tilsamans vóru sjey gyllin í húsinum. Tey fingu 14 seyðir á hesi jørðini, og gav hetta nóg mikið av kjøti til húsið.

Pápin fekk Óla bónda at gera sær bát. So gott útróðrarpláss, sum Lorvík var, merkti hetta, at tey altíð høvdu nóg mikið av fiski.

Tískil høvdu tey ongantíð handilsskuld. Okkurt oyra áttu tey eisini. Hans Petur minnist enntá, at tey hava átt gullpengar. Tann seinasti av hesum peningi varð nýttur til klokkuna, sum hann og Gretha, systirin, keyptu til húsið. Hon varð blivin í ólagi men varð afturgjørd av Johan David á Fløtum í Norðragøtu, sum var ein snillingur á mongum økjum, eisini við urum og klokkum. Hann var annars verfaðir Mallu, dóttir Poul Andreas, beiggja Hans Petur.

Systkini hjá Hans Petur vóru Petronella, Poul Andreas, Hansina, Gretha, Sylverius og Jákup



*Hans Petur sum ungur*

Frederik. Her kann vera nevnt, at Gretha búði niðri, hon gjørdist 103 ára gomul. Hon átti sonin Egon, sum arbeiddi sum tannteknikkari í Føroyum í fleiri ár.

Gretha fór ung niður. Hon hevði tænt hjá stjóranum í Føroya Banka árini 1910-1921 G. M. Havsteen. Tá ið hann flutti aftur til Danmarkar, varð hon biðin um at koma við.



*Hans Petur var nógv undir Íslandi sum ungur, bæði til skips og til lands. Hesin málningur úr Íslandi er málaður av beiggja Nomi listarmanninum Ove Frimodt Jacobsen*

## Til lands í Íslandi

Pápin plagdi at vera til lands í Íslandi eins og tað var vanligt hjá nógvum føroyingum og eisini lorvíkingum tá í tíðini. Tað vóru tvey kompaní úr Lorvík, sum plagdu at vera til lands, og hetta var serliga á Vattarnesi. Hetta merkti, at teir búðu í landi og avreiddu hvønn dag eins og vanligt framvegis er við útróðri. Farið varð á vári við rutuskipi til Íslands og komið varð heim aftur á heysti.

Hans Petur var eisini við til lands á Vattarnesi eitt ár, hetta var í 1931. Tá høvdu teir maskinbát, sum kallaðist Grani.

Landformaður var Johannes Johannesen, vanliga kallaður Lorvíks Jóannes, sum var ein av vinnulívsmonnunum í Lorvík fyrra partin í hini øldini. Hann átti skipini Arizonu, Ortario og Kristionnu. Hann hevði handil, og hann turkaði fisk. Tá vóru heilt aðrar umstøður enn vit kenna. Fyrstu tíðina turkaði hann fiskin heima í síni egnu stovu við at hanga fiskin upp undir loftið!

Men tíverri doyðu hann og sonurin Kristian við Kristionnu undir krígnum, tá ið teir fóru til Bretlands við fiski.

Úrtøkan fyri summarið var kr. 495, sum tá var ein góður eysturlandstúrur við skipi. Teir royndu nokk so víða. Sera nógv royndu teir sunnanfyri oyggj, sum kallaðist Skrúvan. Her var nógvur sildafiskur, sum stóð í klettin. Dýpið var ikki tað stóra, bert 10 favnar, so hetta var lætt fiskarí.

Útróður til lands í Íslandi var í síni tíð ein týðandi partur av okkara fiskiveiðu. Tað er nakað skrivað um tað. Sámal Johansen skrivaði bókina Til Lands, og FF-blaðið hevur eisini havt frágreiðingar um hendan útróður í samband við vitjan í 2003 á gomlu útróðrarplássunum.

Her kann verða nevnt nakað av tí, sum Jóan Jakku á Gerðismørk greiðir frá í bókini hjá Sámali um útróður á Vattranesi. Tað, sum Sámal skrivar, er eisini galdandi fyri Hans Petur, tí teir vóru samstundis á Vattarnesi í 1931. Frammanundan var Jóan Jakku saman við pápa Hans Petur Jákupi har.

Kosturin var vánaligur, men eitt gott var, at teir fingu so nógvan fugl. Beint uttanfyri var ein lítil